## Brúgvin og mýran, s. 114

- Být søguna upp í brot og ger yvirskriftir.
- Hví eitur søgan, sum hon ger? Hvat umboða brúgvin og mýran?
- Kanna myndir og samanberingar. Hvussu roynir høvundurin at lýsa kenslurnar hjá smádronginum við tí, sum er uttan um hann? Hugsa til dømis um maðkapirrur, állar, maðkar og tað sjúka tjaldrið!
- Hvussu verða prestur, sýslumaður og lærari lýstir? Hvat umboða teir? Hví verða teir lýstir soleiðis? Hvør sær teir soleiðis? Hvat sigur henda lýsingin okkum um smádrongin?
- Innihaldsliga ber til at samanbera dreingirnir báðir og smádrongin. Hvørjir mótsetningar eru teirra millum? Eru dreingirnir báðir eins, tann stóri og tann lítli? Ella, hvussu eru teir ymiskir?
- Ger tær tankar um, hví drongurin hopar eftir hæli heldur enn at seta seg upp ímóti dreingjunum.
- Hvønn týdning hevur tað fyri sjálvsvirðingina hjá honum, at hann bakkar og einki ger?